Almannastovan í Suðuroy í vanda

Tvøroyrar Býráð er ikki longur sinnað at betala so nógv fyri Almannastovuna í Suðuroy, sum er á Tvøroyri. Verða samráðingar ikki beinanvegin um nýggjan sáttmála fyri Almannastovuna, verður hon søgd upp

PRINSIPPMÁL
Áki Bertholdsen

Býráðið á Tvøroyri er til reiðar at siga sáttmálan um Almannastovuna á Tvøroyri upp, um ikki samráðingar verða beinanvegin um ein nýggjan sáttmála. Frá vinstru eru teir Dan Nielsen, Heri Mortensen, Pauli Einarsson, Kristin Michelsen, Sverre Midjord og Óli Debes, kommunuskrivari. Við borðendan situr Finnleif Guttesen, borgarstjóri. Bergur Bærendsen var ikki á fundi mánakvøldið

Nú er Almannastovan í Suðuroy í vanda fyri at vera søgd upp.

Tvøroyrar Býráð góðtekur ikki longri at vera noytt til at betala fyri at hava Almannastovu í Suðuroynni, soleiðis sum støðan nú er.

Tí fer kommunan nú at krevja samráðingar við Almanna- og Heilsumálastýrið um nýggjan sáttmála fyri Almannastovuna í Suðuroy. Finnleif Guttesen, borgarstjóri á Tvøroyri, sigur, at tað var í 1976, at sáttmáli varð gjørdur ímillum landsstýrið og allar kommununar í Suðuroy, uttan Vágs Kommunu, um at leggja Almannastovuna í Suðuroy. Í 1995 kom eisini Vágs Kommuna upp í avtaluna.

Eftir avtaluni betalir landið lønirnar til starvsfólkið á Almannastovuni, men kommurnar betala allar hinar rakstrarútreiðslurnar, eitt nú hølisútreiðslur, ljós, varma, telefon o.s.fr.

– Síðani er parturin hjá hvørjari kommunu trektur beinleiðis av kommunuskattinum, uttan at kommunan hevur havat nakra sum helst ávirkan. Haraftur at hevur mannagongdin verið tann, at upphæddin fyri alt árið er tikin beinanvegin, fyrst í januar á hvørjum ári.

Harafturat eru útreiðslurnar ógvuliga nógv hækkaðar í seinastuni. Í fjør var parturin hjá Tvøroyrar Kommunu av rakstrarútreiðslunum hjá Almannastovuni í Suðuroy 88.000 krónur, men í ár er upphæddin meiri enn tvífaldað upp í 174.000 krónur.

– Hetta er hent, uttan at kommunan hevur fingið eitt einasta orð at vita um, hví útreiðslurnar eru so nógv hækkaðar.

Finnleif Guttesen sigur, at kommunan hevur heldur ikki fingið nakran roknskap fyri Almannastovuna so at hon veit hvat hon betalir fyri.

– Ikki fyrrenn nú, vit hava rykt eftir tí, hava vit fingið ein heildarroknskap. Hann sigur, at fyrr í ár setti Kommunan seg skrivliga í sambandi við Almanna- og Heilsumálastýrið fyri at taka málið upp.

– Men haðani hoyrdust ikki eitt orð aftur, ikki so frægt sum nakrar reglur um, at tey høvdu fingið brævið.

Hann sigur, at í august gjørdi býráðið tískil ikki mætari enn at klaga til Løgmann og tá kom eitt svar.

Almannastovan sigast upp

Tvøroyrar Býráð góðtekur ikki hesa mannagongd longur og tað góðtekur heldur ikki uttan víðari, at kommunan skal betala fyri at hava almannastovu í Suðuroy.

Í hvussu so er vil kommunan ikki uttan víðari góðtaka at betala so nógv. Kommunan góðtekur heldur ikki, at tað skal bera til at útreiðslurnar skulu hækkast yvir 100% upp á eitt ár, uttan at kommunan fær nakað sum helst at vita, og at peningurin verður trektur av skattinum, uttan víðari.

Finnleif Guttesen sigur, at Býráðið hevur sóknast eftir lógarheimildum fyri hesum, men tað er onki at vísa á, uttan avtalurnar við kommnunurnar.

– Eg havi altíð hildið, at táið peningur skuldi fylgja við, tá ið almennir stovnar vórðu lagdir út um landið.

– Men tað er ikki gjørt í hesum føri og tað góðtaka vit ikki longri.

– Vit halda ikki, at vit eiga at betala fyri, at almannastovan skal vera í Suðuroy. Heldur ikki góðtaka vit, at vit onki fáa at vita og at vit onga ávirkan skulu hava.

Býráðið hevur tí eimælt samtykt at krevja nýggjar samráðingar við Almannna- og Heilsumálastýrið um almannastovuna í Suðuroy.

Og tær samráðingarnar skulu vera beinanvegin.

Býráðið ásannaði at tað var so trupult at fáa svar frá Almanna- og Heilsumálastýrinum, at tað kravdi at fáa svar áðrenn 18. september um samráðingarnar, tá ið fíggjarlógin fyri næsta ár, aftur skal til viðgerar.

Hevur Almanna- og heilsumálastýrið ikki svarað tá, er Tvøroyrar Kommuna tilreiðar at siga sáttmálan um almannastovuna upp.

Upprunaliga varð skotið upp at Býráðið skuldi siga sáttmálan upp, men summir býráðslimir stúrdu fyri, at Almannastovan so fór at enda í Vági og tað vildu teir ikki. Tí vildu teir lata møguleikan fyri samráðingum standa opnan.

Tíggju skeinkiloyvi afturat til Tvøroyrar

Øll skeinkiloyvini á Tvøroyri eru í brúki, men tørvur er á fleiri, sigur Býráðið

SKEINKING
Áki Bertholdsen

Á Tvøroyri stendur talið á skeinkiloyvum ikki mát við hugin at skeinkja. Kvotan hjá Tvøroyrar Kommunu er fýra skeinkiloyvi. Nú hava tey rent seg ímóti kvotaloftinum og vilja tí hava fleiri skeinkiloyvir

Myndin er tilvildarlig

Tað eru ov fá skeinkiloyvi á Tvøroyri

Tað heldur Tvøroyrar Býráð.

Býráðið fer tískil nú at søkja um at fáa fleiri skeinkilovyi til Kommununa.

Í løtuni eru fýra skeinkilioyvi í Tvøroyrar Kommunu og tey eru øll í brúki. Tað eru hotellini í Øravík og á Tvøroyri, umframt Klubbin og listaskálin, Oyggin, á Tvøroyri, sum hava skeinkiloyvini, sum eru til taks. Tað hjá Oynni er eitt hálvt skeinkiloyvi, tvs, at tey hava bara loyvi at selja vín og øl.

Men nú hevur maður á Tvøroyri søkt um at fáa skeinkiloyvi afturat.

Málið var fyri á býráðsfundi á Tvøroyri mánakvøldið. Har varð mett, at brúk fór at vera fyri einum trimum skeinkiloyvum afturat í næstu framtíð, men so leingi kvotan bara eru fýra loyvi, gerst onki

Tí samtykti býráðið einmælt at søkja landsins myndugleikar um at fáa 10 skeinkiloyvi afturat til Tvøroyrar Kommunu.

Onkur býráðslimur helt, at hetta var kanska at taka í so rívan til at biðja um 10 loyvi í einum.

Men vístvarð á, at hetta var ikki tí, at ætlanin var at brúka øll loyvini beinanvegin. Tað er heldur ikki Býráðið, sum gevur loyvini, men Loyvisnevndin, sum er undir landstýrinum. Tað, einasta Býráðið hevur at gera, er at ummæla tær umsóknir um skeinkiloyvi, sum søkt verður um í kommununi.

Og Býráðið heldur, at tað er hent at hava nøkur loyvi niðurfyri, so at tað gerst óneydugt at søkja um at hækka kvotuna eitt og eitt loyvi, hvørja ferð, ein umsókn kemur.

Víst verður m.a. á, at í Tórshavnar Kommuna varð kvotan munandi hækkað í einum, so at tað ikki var neydugt at søkja um eitt og eitt lovyi, so hvørt, brúk var fyri tí og tað er somu mannagongd, tey nú vilja hava á Tvøroyri

Helvtin kundi verið bjargað

18 fólk, sum eru deyð í ferðsluni seinastu 14 árini, høvdu komið frá ólukkuni við lívinum um tey høvdu nýtt trygdarbelti

HAGTØL
Turið Kjølbro

Á hvørjum ári lata nógv fólk lív í ferðsluni, tey flestu ungfólk. Helmingurin kundi verið bjargaður, um tey nýtt trygdarbelti

Savnsmynd

Talið á fólki, sum eru deyð av ólukku seinastu tíggju árini, liggur millum 6 og 23 á hvørjum ári. Hetta sæst í heilsulagslýsingini hjá landslæknanum fyri Føroyar fyri 2000, sum júst er komin. Í fjør doyðu 12 fólk av ólukku, harav trý í ferðsluni.

Ein uppgerð yvir nýtslluna av trygdarbelti millum bilførarar og ferðafólk, sum doyðu í ferðsluni í tíðarskeiðnum frá 1. januar 1986 til 31. desember 1999 vísir, at átta teirra nýttu trygdarbelti ella hjálm, meðan 37 fólk nýttu hvørki trygdarbelti ella hjálm. Í tíggju førum ber ikki til at ávísa, um trygdarbelti ella hjálmur vóru nýtt. Landslæknin metir, at umleið helmingurin av teim 37, sum doyðu í ferðsluni hesi ungfólkum. Tí er sera umráðandi, staðfestir landslæknin, at bilførarar og fólk, ið annars ferðast í bili, altíð brúka trygdarbelti - uttan mun til, hvussu langur ella stuttur teinurin er.

Í fjør vóru trý andlát orsakað av falli ella omandøtti. Í fýra førum doyðu fólk av, at luftvegirnir vóru stongdir. Tvey druknaðu og somuleiðis tvey beindu fyri sær. Talið á sjálvmorðum á hvørjum ári seinastu árini liggur um tvey, í fyrraárið var einki sjálvmorð meðan í 1992 vóru seks sjálvsmorð. Vit skulu heilt aftur til 1988, tá ið seinasta drápið varð framt í Føroyum.

fjúrtan árini, uppgerðin umfatar, kundu verðið bjargað um tey høvdu nýtt trygdarbelti. Sostatt kundi trygdarbelti havt bjargað 18 fólkum, í nógv flestu førum

Mistrivnaður kannast

Arbeiðsbólkur við samfelagsfrøðingi á odda skal nú kanna, hví lærarar støðast so illa í føroyska fólkaskúlanum

FÓLKASKÚLIN
Turið Kjølbro

Føroyski fólkaskúlin krevur í dag væl brynjaðar og eldhugaðar lærarar. Lærarar, sum brenna fyri sínum yrki og børnum ikki minst. Men tað er ein sannroynd, at nógvir lærarar mistrívast, ónøgdin er stór og fleiri leita eftir øðrum avbjóðingum ella nýggjum íblástri uttan fyri skúlan. Føroya Lærarafelag tekur hesar álvarsomu ábendingarnar í ramasta álvara. Á nevndarfundi í felagnum í seinastu viku var málið á skránni. Røtt varð um, hvussu farast skal fram í hesum so átrokandi máli. Samtykt varð at seta arbeiðsbólk við einum samfelagsfrøðingi sum samskipara, formanni felagsins og umboðum fyri ymiskar skúlastøddir millum álitisfólk felagsins.

At mistrivnaðurin er vorðin so sjónligur seinnu árini, kemst av eini samanrenning av, at játtanin til undirvísingina er ov lítil á hvørjum ári, at skúlarnir ikki fáa fylgt nýggju fólkaskúlalógini, og at fleiri og fleiri truplir næmingar eru í skúlanum, sum gera arbeiðið hjá lærarum møtimikið. Onnur viðurskifti gera eisini sítt til, at lærarar ikki støðast væl í lærarayrkinum, eitt nú at teir í størri og størri mun eru noyddir at átaka sær uppalingarligu uppgávuna yvir fyri næmingum.

- Vánaliga fíggjarstøðan ígjøgnum øll nítiárini hevur gjørt, at øll húka á knøunum. Øll eru í døpurhuga. Vit vita, at nógvir lærarar høvdu stungið í sekkin, um teir ikki brendu fyri fólkaskúlanum. Einasta orsøkin til, at tey eru verandi, er, at hjarta teirra brennur fyri fólkaskúlanum og børnunum, sigur Elsa Birgitta P. Petersen, forkvinna í Føroya Lærarafelag.

Enn er ov tíðliga at siga, hvussu umfatandi arbeiðið í bólkinum verður, og nær tað verður liðugt.

Mistrivnaðurin millum lærarar er ikki ókendur í Mentamálastýrinum. Í viðtali í blaðnum í síðstu viku segði Óli Holm, landsstýrismaður í mentamálum, at tað er sera umráðandi at taka hesar ábendingarnar í álvara.

- Vit eiga at lurta eftir lærarum og gjølliga umhugsa, hvat vit eiga at gera fyri at venda gongdina, segði hann.

Betri sømdir til børn

Skúlafólk eru nú farin undir at arbeiða fyri, at næmingar við serligum tørvi fáa minst sama stuðul í skúlatíðini sum áðrenn og eftir skúlatíð

FÓLKASKÚLIN
Turið Kjølbro

- Lærarar brenna út og verða stressaðir av at síggja, at børn eru fyri vanbýti í flokkinum, sigur Elsa Birgitta P. Petersen, forkvinna í Føroya Lærarafelag

Ein sannroynd er, at nógvir næmingar, sum hava serligan tørv á stuðli, lítlan og ongan stuðul fáa í skúlaárinum, sum júst er farið av bakkastokki. Bert helmingurin av tímunum, skúlarnir kring landið bóðu um, vóru játtaðir av Mentamálastýrinum. Hetta merkist í hvørji einastu skúlastovu kring landið, og tað, sum undrar lærarar ikki sørt, er, at nógvir næmingar, sum hava serligan tørv, fáa góðan stuðul áðrenn og aftaná skúlatíð. Hendan stuðulin veitir Almannastovan.

- Tað sigur seg sjálvt, at hesum næmingum eisini tørvar stuðul í skúlanum, tí tá eru teir saman við nógvum øðrum børnum og skulu virka í skúlahøpi, segði Paulina Poulsen, lærari í Eysturskúlanum í viðtali í blaðnum fyri tveimum vikum síðani.

Á aðalfundi hjá Føroya Lærarafelag í vár, varð álagt nevndini í felagnum at arbeiða fyri, at næmingar við serligum tørvi fáa minst sama stuðul í skúlatíðini sum áðrenn og eftir skúlatíðina. Uppskotið aftanfyri hesa áheitanina eigur Fuglafjarðar skúli. Í viðmerking til uppskotið sigur Fuglafjarðar skúli, at Almanna- og heilsumálastýrið veitir hesum næmingum aðrar og betri sømdir áðrenn og eftir skúlatíð, enn Mentamálastýrið vil veita teimum í skúlanum til stóran ampa fyri øll, bæði børn, foreldur og lærarar.

Skúlafólk, sum hava góðar fortreytir málinum viðvíkjandi, eru nú farin undir at viðgera málið nærri. Arbeiðsbólkur er settur við Emmy S. Joensen, næstforkvinnu í Føroya Lærarafelag, sum forkvinnu. Umframt er bólkurin mannaður av lærarum kring landið. Ætlanin er, at arbeiðið skal verða liðugt um nakrar mánaðir, í seinasta lagi í hesum skúlaárinum.

- Lærarar brenna út og verða stressaðir av at síggja, at børn eru fyri vanbýti í flokkinum. Teir standa hjálparleysir, tí teir ikki fáa hjálpt, sigur Elsa Birgitta P. Petersen, forkvinna í Føroya Lærarafelag.

Í viðtøkunum hjá Føroya Lærarafelag stendur, at lærarar eisini skulu taka sær av námsfrøðiligum viðurskiftum í fólkaskúlanum, og málum, sum hava týdning fyri arbeiðsumstøðurnar hjá lærarum.

- Talið á børnum, sum hava serligan tørv, veksur á hvørjum ári. Skúlin er fyri øll og foreldur í dag eru sera tilvitað um, hvønn rætt børn teirra hava til undirvísing.

- Trupulleikin verður ikki minni av, at lærarar ikki hava eftirútbúgving í at undirvísa næmingum við serligum tørvi. Teir kunnu jú vera rættiliga ymiskir. At skúlaflokkarnir eru so stórir, gera trupulleikarnar størri. Tað er sera óheppið fyri allan flokkin, at nakrir næmingar, sum hava serligan tørv, ikki fáa hjálp, sigur Elsa Birgitta P. Petersen.

Forkvinnan í Føroya Lærarafelag vónar, at ikki bara landsstýrið, men alt Føroya Løgting, sær álvaran í hesum máli.